Til róðrarfeløgini

Tórshavn, 26. juli 2018

**Kunningarskriv**

**FM-heiðursmerkjahandanin 2018**

Boðað verður hervið frá, at FM-heiðursmerkjahandanin verður á sama stað, sum Ólavsøkuheiðursmerkjahandanin.

Tað vil siga, at FM-heiðursmerkjahandanin eisini verður millum róðrarnar á pallinum við dráttin. Heitt verður tí á manningar, ið verða nummar 1, 2 og 3 til FM at fara til dráttin beint eftir róðurin. Umboð fyri Róðrarsamband Føroya standa við dráttin og vegleiða, hvussu farast skal fram.

**Røða løgmans og handanin av Útvarpssteypi og Kolturssteypi**

Røðan hjá løgmanni og handanin av Útvarpssteypinum og Koltursteypinum verður eisini við dráttin á sama staði sum heiðursmerkjahandanin.

Løgmaður ber fram røðu og handar Útvarpssteypið og Koltursteypið beint eftir heiðursmerkjahandanina hjá 10-mannaførunum. Steypahandanin endar við, at rógvarar og áskoðarar syngja fyrsta ørindi av tjóðsanginum.

Aftaná sangin verða konfettikanónirnar skotnar, og felagsmyndin av øllum FM-vinnarunum veður tikin við Bursatanga undir Skansavegnum, har hon vanliga verður tikin.

Við hesum verður heitt á róðrarfeløgini um vinarliga at boða manningunum frá hesum.

Vinarliga

Róðarsamband Føroya